Bjarni Hammer
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Suðuroyartunnilin, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvat varð úrslitið av forkanningunum í sambandi við komandi Suðuroyartunnilin, sum vórðu gjørdar í 2020, og hvat verður tað næsta stigið?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at kalla allar flokkar á tingi saman til at gera eina felags semju um Suðuroyartunnilin?
3. Nær ætlar landsstýrismaðurin at seta á stovn P/F Suðuroyartunnilin?

Viðmerkingar
Forkanningar til komandi Suðuroyartunnilin vórðu gjørdar í 2020 fyri nærum 5 milliónir krónur. Tær flestu kanningarnar blivu gjørdar á sumri, m.a. seismiskar kanningar, sum Landsverk stóð fyri. Greiningarnar skuldu taka 2-3 mánaðir. Um ætlanin er at byrja uppá Suðuroyartunnilin, tá Sandoyartunnilin er liðugt boraður, er neyðugt, at forarbeiðið heldur áfram. Um vit ætla at varðveita føroysku arbeiðsmegina og tunnilskunnleikan, sum er mentur í Føroyum seinastu árini, so skal arbeiðið uppá Suðuroyartunnilin byrja beinanvegin aftaná Sandoyartunnilin.
Á vári 2020 legði undirritaði uppskot fyri tingið um at seta á stovn partafelag at gera undirsjóvartunnil til Suðuroynna; sami leistur, sum er brúktur til hinar undirsjóvartunlarnar í Føroyum. Uppskotið bleiv felt av samgonguni, sum metti tað vera einasti rætti framferðarháttur, men sum samstundis metti, at tað ikki hevði skund at seta á stovn partafelag at gera undirsjóvartunnil til Suðuroynna. Ein grundgeving fyri at fella uppskotið var, at allir flokkar skuldu semjast um ein felags framferðarhátt, og í tí sambandi varð heitt á landsstýrismannin, bæði frá andstøðu og samgongu, um beinanvegin at kalla umboð fyri allar flokkar saman. Endamálið skuldi vera at finna eitt felags stev í sambandi við tunnilsgerðina av Suðuroyartunlinum. Tað táttar í eitt ár síðan, og enn hava vit onki frætt frá landsstýrismanninum.
Tað er fleiri ferðir borið fram á Løgtingi, at rættast er at brúka just sama framferðarhátt, tá farið verður undir Suðuroyartunnilin, sum tann, ið bleiv brúktur, tá hinir undirsjóvartunlarnir vórðu og verða gjørdir - eina yvirskipaða politiska semju og at stovna eitt alment partafelag at taka sær av byggingini av Suðuroyartunlinum. Tí er viðkomandi at fáa at vita, nær landsstýrismaðurin ætlar at seta partafelagið á stovn. Tað er skjótt eitt ár, síðani fyrsta royndin bleiv gjørd, og tað lá í kortinum, at tað ikki skuldi ganga long tíð, til partafelagið bleiv stovnað. Men enn vita vit einki.
Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 14. januar 2021

Bjarni Hammer